


www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 03 - 2012

# Statoil eydnuna við sær í Brasil

Sigursgongdin hjá norska oljufelagnum Statoil tikist ongan enda at fáa. Nú um dagarnar bórust tey tíðindi í altjóða oljuheiminum, at Statoil hevur gjørt enn eitt stórt oljufund, hesaferð út fyri strondina í Brasil. Saman við almenna oljufelagnum Petrobras og Repsol hevur boriskipið Stena DrillMAX rakt við stórar nøgdir av olju. Talan er um eina sokallaða high impact keldu, sum merkir, at tað her kann snúgva seg um eitt rættiliga stórt fund, tá avtornar. Tað er bara góð vika síðani, at Statoil rakti við gass uttan fyri eysturstrond Afrika, nærhendis Tanzania. Hesi fundini koma eftir aðrar fyri Statoil stórhendingar í Norðsjónum og Barentshavinum. Talsfólk hjá Statoil siga, at fundið er sera kærkomið, nú felagið roynir at menna sítt virksemi út fyri Brasil. Statoil er longu fyristøðufeløg í Brasilia á eini stórari oljukeldu, sum fór undir framleiðslu í fjør. Hinumegin Atlantshavið, út fyri Angola hevur Statoil fyri kortum fingið tillutað leitiloyvi í økjum, sum líkjast tí í Brasilia. Tað leitiloyvi var mett sum ein stórur sigur fyri Statoil, sum hevur lagt seg eftir við síni nýggjastu strategi at taka á seg at bora brunnar í váðafullum nýggjum økjum kring heimin. Seinasta fundið í Brasilia er tað sætta í eini røð av væleydnaðum high impact leitibrunnum hjá Statoil hesar seinastu 12 mánaðirnar.

